Bjarni Djurholm, orkumálaráðharri:

# – Vit vanda okkum ikki nóg v

**- Í nútímans samfelagnum er atgongd til orku ein sjálvfylgja, og eigur samfelagið at skapa karmar fyri, at orkuveitingin er so trygg sum gjørligt, eins og brúkarin fær orku so bíliga sum tilber innan teir karmar, sum orkupolitikkurin setir. Men neyðugt er at gagnýta oljuna so skilagott sum gjørligt, soleiðis at vit ikki brenna meir enn neyðugt og harvið økja um útlát av skaðiligum evnum, segði landsstýrismaðurin í orku-og umhvørvismálum, Bjarni Djurholm, á fundi í Norðurlandahúsinum mánadagin**

ORKA-OG UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Mánadagin skipaði Vinnumálaráðið fyri áhugaverdum og vælmøttum fundi í Norðurlandahúsinum, har landsstýrismaðurin í orkumálum, Bjarni Djurholm, legði fram fyribils uppskot til føroyskan orkupolitikk. Við á fundinum var eisini fyrrverandi danski orku-og umhvørvismálaráðharrin, Svend Auken, sum helt áhugaverdan fyrilestur um orku og umhvørvi.

Bjarni segði, at fyrsti fundurin í hesi røðini varð hildin um hesa tíðina í fjør, tá ið Bjørn Lomborg helt fyrilestur við støði í bók síni, Verdens sande tilstand – og í dag er so Svend Auken komin at greiða okkum frá sínum royndum sum ráðharri í Danmark á markamótinum millum orku og umhvørvi.

- Hesi bæði økini eru sum kunnugt ógvuliga nær knýtt, legði landsstýrismaðurin aftrat.

## Arbeiðsbólkur

Bjarni segði, at á sumri í fjør setti Vinnumálaráðið ein arbeiðsbólk og ein hoyringsbólk at orða uppskot til orkupolitikk og eina el-veitingarlóg fyri Føroyar. Í bólkunum sita umboð fyri Vinnumálaráðið, Oljufyrisitingina, SEV, Røkt, kommununnar, Føroya Náttúru-og Umhvørvisverndarfelag og vinnulívið.

- Hetta arbeiði skal eftir ætlan verða liðugt á sumri 2006, og í arbeiðssetninginum verður áherðsla løgd á, at ávegis kunning verður framd. Tað er í hesum høpi, at orðaskiftið um orku var á løgtingi fyrr í ár og dagurin í dag skulu síggjast.

Bjarni kunnaði síðan um arbeiði at orða ein føroyskan orkupolitikk og elveitingarlóg.

- Við vaksandi oljuprísum og skaðiligari ávirkan á okkara umhvørvi, er tað alt meira umráðandi, at vit tryggja eina so munadygga gagnnýtslu av okkara orkutilfeingi sum yvirhøvur gjørligt.

Landsstýrismaðurin segði, at tá ið tosað verður um orkupolitikk, verður hesin vanliga býttur í trý atlit, sum hann tók til; orka, búskapur og umhvørvi.

- Okkara orkuskipan má verða soleiðis háttað, at hon er búskaparliga skilagóð og samstundis, at hon ávirkar okkara umhvørvi minst møguligt. Hetta er avbjóðingin.

Hann vísti á, at vit í dag innflyta mest sum alla orku í formi av ymsum oljuúrdráttum, meðan ein minni partur av okkara orkutørvi verður nøktaður av "heim-




*Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í orku-og umhvørvismálum, greiddi fr*



***Stórur áhugi var fyri fundinum um orku-og umhvørvi, sum Vinnumálaraðið skipaði fyri í Norðurlandahúsinum mánadagin. Nógv fólk vóru og lýddu á – og fólk settu eisini Svend Auken spurningar***

***Mynd: Jens Kr. Vang***